## DAGSINS MEINING

# Okkurt má gerast annars steðgar alt samfelagið upp

Verkfallið hjá maskinmeistarunum hjá SEV hóttir nú av álvara við at leggja alt landið lamið. Hóast ymsu partarnir av landinum "bara" liggja í streymloysi part av degnum, so er hetta ein heilt ónøktandi støða fyri vinnulívið og øll onnur í samfelagnum. Verandi støða átti ikki at verið íkomin eru øll samd um. Hóast tann støðfestingin ikki bøtir um støðuna nú, so átti skipanin við hesum partinum av arbeiðsmarknaðinum at verið broytt fyri langari tíð síðani. Vit áttu at havt lært av støðuni fyri tveimum árum síðani.

Í blaðnum í dag verður funnist harðliga at eitt leiklutinum hjá landsstýrinum í aktuella málinum. Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur sigur, at tað gevur púrt onga meining at samráðast undir slíkum fyritreytum. Bárður Nielsen skuldi verið komin uppí leikin beinanvegin. Alt annað er tekin um óveruligar samráðingar, sigur Jógvan Mørkøre um støðuna millum SEV, Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið. Hann leggur heldur ikki fingrarnar ímillum, tá hann skal lýsa leiklutin hjá landsstýrinum í hesum máli.

- Landsstýrið sum arbeiðsgevari má heilt einfalt taka annað skinn um bak, tí hetta er at halda mótparin fyri tað turra spott. Verandi støða er eitt tekin um vantandi skipan á arbeiðsmarknaðinum. Ein fortreyt fyri einum vælvirkandi arbeiðsmarknaði er, at samráðingar fara fram undir skipaðum viðurskiftum, og at talan er um veruligar samráðingar. Tann, sum situr við samráðingarborðið, má hava fult mandat til at taka avgerðir, ella má tann, sum gevur mandatið, vera við undir samráðingunum, sigur samfelagsfrøðingurin.

Advokatur blaðið hevur tosað við heldur ikki, at verandi skipan við SEV er nøktandi. Tað er neyðugt, at tað almenna hevur eftirlit við sáttmálum hjá eini monopol-fyritøku sum SEV, tí at ein slík fyritøka nýtist ikki at vera eins varin við útreiðslunum og ein fyritøka, ið virkar undir marknaðarbúskaparligum treytum, sigur Bjørn á Heygum, advokatur. Hann heldur, at SEV sleppur ov lætt at hækka lønirnar hjá maskinmeistarunum uttan at taka onnur fyrilit og vísir á, at samskiftið millum SEV og Fíggjarmálaráðið burdi verið betri. Undir øllum samráðingum er tað ein grundleggjandi fortreyt, at samráðingarnevndirnar eru suverenar og kunnu taka endaligar avgerðir ístaðinfyri at skriva undir sáttmálar við fyrivarni. Tað er ein keðilig støða, at vit hava ein triðja part, ið ikki tekur lut í samráðingunum, tí sjálvandi er tað betri, at tann parturin, ið hevur síðsta orðið, er við í samráðingunum, sigur Bjørn á Heygum, sum harvið mælir landsstýrinum til at taka lut í samráðingunum, so at eitt møguligt úrslit altíð var endaligt. Advokaturin heldur, at vit kunnu seta eitt stórt spurnartekin við, um her er talan um realitetssamráðingar, tá almenni eftirlitsmyndugleikin ikki er við.

Hetta eru so bert nakrar av viðmerkingunum til aktuellu støðuna í blaðnum í dag. Tað er greitt, at føroyska samfelagið kann ikki framhaldandi liva við, at partarnir bara láta standa til. Hvør enn kann ábyrgdast fyri íkomnu støðuna, so verður neyðugt at finna eina skjóta loysn. Einki samfelag heldur til eina slíka støðu. Orkuveiting er ein so vitalur partur av samfelagnum, at slíkt verkfall kann als ikki samanberast við nakað annað. Her má og skal henda nakað, og tað alt fyri eitt. Um ikki partarnir sjálvir megna at seta seg saman aftur, so eigur Semingastovnurin at koma uppí aftur. Ber tað heldur ikki til, so má landsstýrið, í fyrsta lagi fíggjarmálaráðharrin taka stig til eina loysn, í øðrum lagi má sjálvur løgmaður uppí og brúka sína støðu til at fáa glið á. Hvat partarnir og fólk enn halda um skeivleikar í skipanini og tilgongdini annars, og hvussu hesir kunnu broytast og bøtast, so stendur eitt fullkomiliga greitt, og tað er, at ein endi má fáast á hesi fyri alt samfelagið púra óhaldbaru støðu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKING

# Danir skulu gjalda døgurða til okkara eldru – meðan vit vælbjargaðu fáa lættar

**Høgni Hoydal**



**Sambandssamgongan er tann umvendi Robin Hood: Hon tekur frá teimum veiku og gevur teimum sterku. Síðani gevur hon øðrum skyldina og sigur, at Danmark skal gjalda fyri okkara egna órættvísi.**

Sjálvandi vistu vit, at tað fór at koma. So vist sum jørðin er rund.

Sambandsflokkurin roynir at renna undan samgongunnar egnu ómegd mótvegis okkara eldru og óhjálpnu við at geva Tjóðveldisflokkinum og minkandi blokkstuðlinum skyldina.

Á vøllinum eru m.a.: Helgi Abrahamsen, skrivari sambandsfloksins, sum roynir at rokna út við sínum lummaroknara, at um vit nú bert høvdu blokkstuðulin, so var alt gott og øll fingu sítt.

Og Marjus Dam, ið fer eitt stig longur, og vil hava samgonguna at fara til Danmarkar at bidda um meira blokkstuðul, so tey eldru og brekaðu kunnu fáa síni dagtilhald aftur og matur aftur kann koyrast út til tey eldru.

Eg fari at takka teimum báðum fyri, at teir so greitt prógva, hvussu ábyrgdarleysur og ússaligur hesin sambandspolitikkur er. Hvar vit enda, um henda samgonga sleppur at halda fram. Og hvussu asosialur, ósolidariskur og niðrandi mótvegis okkum sjálvum sum fólk, sambandspolitikkurin í veruleikanum er.

**Hvar vóru tilboðini við fullum blokkstuðli?**

Til Helga Abrahamsen er bert at siga: Føroyar eru farnar heysin fleiri ferðir við fullum blokkstuðli, og tað hevur altíð kosta teimum veikastu dýrt, meðan tey ríkastu hava flotið omaná.

Hvar vóru dagtilhaldini, matarskipanin fyri eldri og øll tilboðini á sosiala økinum, tá vit fingu hækkandi blokkstuðul hvørt ár?

Hesi tilboðini eru komin, meðan fullveldissamgongan sat, og **eftir** at blokkurin varð minkaður. Ongantíð eru hend so stór framstig á sosiala økinum, sum undir fullveldissamgonguni. Tað er prógvfast.

**Tjóðveldisflokkurin vil at vit gjalda í felag**

Tjóðveldisflokkurin stendur rimmarfastur í síni hugsjón um, at tað eru vit í felag í Føroyum, sum skulu gjalda fyri vælferðina - og at vit ikki kunnu spæla solidarisk við donskum pengum.

Og vit hava prógvað, at hetta er vegurin fram. Tá vit ikki kunnu senda rokningina til Danmarkar, noyðast vit at raðfesta okkara vælferð í Føroyum. Og Tjóðveldisflokkurin raðfestur soleiðis, at vit strika studning til vinnulívið og serágóðar til tey vælbjargaðu, og styrkja ístaðin almannaøkið, útbúgving, gransking, mentan og umhvørvi. Tað hava vit gjørt seinastu 6 árini, og av tí eru vit errin - hóast alt verri enn so var nóg gott í undanfarnu samgongu. Harafturat høvdu vit yvirskot hvørt ár á fíggjarlógini, tí vit brúktu ongantíð meira enn vit tjentu.

**Samgongan skerjir tey veiku**

Henda samgongan ger beint øvut av politikki og hugsjón Tjóðveldisfloksins. Hon skerjir hjá teimum veikastu. Hon skerjir útbúgving, gransking og mentan. Hon skerjir umhvørvismál.

Men hon letur studning til útvaldar vinnulívsbólkar. Letur skattalættar til tey ríkastu. Lækkar avgjøld á luxusvørum. Og hon tykist tilvitað at lata alla fíggjarstýring og búskaparstýring upp fyri skutil, so hon kann prógva, at føroyingar megna ikki at skapa eitt gott samfelag og at býta ágóðarnar javnt.

**Hevði eg bert fingið lummapengar í allar ævir...**

Eg vóni ikki, at Helgi Abrahamsen ætlar at uppala síni børn á sama hátt sum hann vil reka politikk í Føroyum.

At hugsa sær, um tey ungu fara at seta seg við lummaroknaran og spyrja sum Helgi: Hvussu nógvar pengar hevði eg átt, um eg fekk lummapengar frá foreldrunum í ókomin ár? Heldur enn at tosa um, hvussu tey kunnu lyfta í felag saman við øðrum.

At hugsa sær, um okkara børn og abbabørn, hvørja ferð tey skulu lata nakað burturav til felagsskapin og til tey, sum tørva hjálp, fara at siga: Nei, sovorðið skulu foreldrini hjá mær gjalda! Mínir pengar skulu fara til mín sjálvs - til dýrar lutir - og skal eg gjalda nakað, so skal tað vera til nakað, sum eg sjálvur fái nakað beinleiðis burturúr!

Og at hugsa sær, um okkara mongu dugnaligu vinnulívsfólk fylgdu sambandshugsanini hjá Helga. Um fiskivinnan heldur enn at royna at skapa virðir, sat og roknaði út, hvussu nógvar pengar hon hevði átt, um kilostudningur, oljustudningur, íløgustudningur og veðhald, enn vóru í gildi? Tað kundi Helgi Abrahamsen passandi sett seg niður at rokna út og fortalt vinnulívinum. Og Helgi eigur tá endiliga at royna at fáa fólk at gloyma, at fiskivinnan fór logandi á heysin, tá hesin hugburður valdaði í Føroyum.

**Læknin vil ikki hava rokningina**

At slíkur hugburður gerst úrslitið, um vit sleppa málinum um einar sjálvstøðugar, sjálvbjargnar og sam-

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.